# Minningarorð um abba mín Jóhan Mørkøre

**f. 14. december 1917 - d. 2. apríl 2006**



Nú er rúm tíð farin síðan abbi í Hósvík doyði og líka leingi havi eg hugsað, um eg yvirhøvur skuldi skriva nakað minningarorð. Abba dámdi ikki, at nakað hóvasták var gjørt burtur úr honum, men av tí at tit bæði, tú og omma ongantíð hava gjørt mun á okkum, ja so fari eg heldur ikki at gera mun á tykkum.

Tað er løgið at lýsa mannin abba Jóhan Mørkøre, tí eg minnist tvær persónligheitir. Eina tá ið eg var barn og eina aðra, nú eg eri vaksin.

Sum barn minnist eg ein stillan mann sum lítið og einki segði. Sat í sama stað við endan á borðinum tá ið vit ótu. So aftur til arbeiðis niðri á asfaltgoymsluni. Tað mesta sum hoyrdist frá honum var hansara eyðkenda njós. Hart sum eg veit ikki hvat. Men kom eg á gátt um kvøldið ein gerandisdag og skúlagongd var dagin eftir, ja so var fyrsti spurningur: Ert tú ikki farin í song? Skalt tú ikki í skúla í morgin? Seinni fann eg eisini út av, hví omma altíð visti, nær eg hevði verið niðri á Toftasandi.

Men sum árini gingu og vit bæði at enda komu at eta í sama húsi her hjá mammu og babba, so gjørdist mín mynd av abba ein onnur. Abbi var altíð góður í ráðum og hvørja ferð eg sat og ivaðist, um eg skuldi hanga klæðir út ella ikki, hugdi tú út og eftir hvat Hann hevði sagt um veðrið, segði tú mær, um tað fór at vera turt ella ikki. Tað var bæði ein góð hjálp og ein sera góður eginleiki tú hevði, og tað løgnasta var, at tú rakti plett hvørja ferð. Hetta hugsi eg ofta um nú tú ert farin.

Stóra vitan hevði tú, men nógv hevur tú ikki reypað, tí at eftir at tú ert deyður, havi eg fingið at vita, at tú skeyt eitt mál, sum gjørdi at EB fekk ein pokal í tínum fótbóltsdøgum. Hevði tú verið her á foldum, vart tú nakað spentur nú. Tann næsti pokalurin er í eygsjón.

Síðan eg, Jógvan og Jónas fluttu til Føroyar í 2002 og eftir at Karin sama árið var fødd, knýttust okkara bond nógv meira enn fyrr.

Tú og Karin høvdu eitt serligt vinarband, og tá ið Karin kom inn at eta, spurdi hon beinanvegin eftir langabba, og tað sama gjørdi tú, um børnini ikki vóru heima.

Fyri fyrstu ferð kom eg at kenna teg sum skemtingarsaman, og ongantíð havi eg fingið lokkað abba at taka tenninar úr. Tú flenti um alt fimmoyrað, og Jónas mundi mist eyguni, tá ið gebissið glepsaði eftir honum í hondini. Tað gloyma hvørki hann ella Karin.

Ja langabbi vart tú til tíggju børn (tvey vóru á veg), og tú gleddist saman við okkum, tó um tú vart móður, serliga um veturin. Árini vóru mong, og vit góðtóku, at tú fórt ikki at vera millum okkum í nógv fleiri ár.

Men endin var ikki tann, vit ynsktu, og hóast nógv høvdu ilt av mær at koma fram á teg full upp undir hendur, so hevði eg nógv meira ilt av tær, sjálvt um eg veit at tú onga pínu hevði.

Tað var keðiligt at Karin ikki slapp at síggja teg í kistuni, tí at viðhvørt hevur hon ilt við at viðurkenna at tú ert deyður. Mamma blundar langabbi? Er hann í klæðum?

Tað hjálpti nógv, at babba segði henni, at tá ið henni leingist eftir langabba, skal hon hyggja upp til stjørnurnar, tí har situr langabbi og veittrar til hana. Eg síggi tykkum fyri mær. Mann og konu. Annan sum argar við einum skálkasmíli og hin flennandi: »Halt hol við tær«. Soleiðis minnist eg tykkum hjúnini Mørkøre. Lívið kundi vera strævið, men har var altíð okkurt at flenna eftir og fegnast um.

Nú er tann myrka tíðin komin, sum tóktist tær so tung. Hana slapst tú undan hesa seinnu helvtina av árinum. Tú náddi at síggja sólina koma til bygdina eina seinastu ferð. Men Karin er fegin um at tann myrka tíðin endiliga er komin. Stjørnurnar eru nú at síggja á himmalinum.

**Eyðgerð**

## Andlát og jarðarferðir

**Fridolga Jacobsen í Vági**, ættað úr **Svínoy**, andaðist á Suðuroyar sjúkrahúsi týsdagin 17. oktober, 78 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Óla Frits Hansen av Húsum** fer av kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi hósdagin kl. 16 til Sam. Jarðarferðin verður úr Húsar kirkju fríggjadagin kl. 13.30. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu lata Húsa kirkju ein gávu; konta í Føroya Banka og Norðoyar Sparikassa. Í samband við jarðarferðina siglur Sam av Klaksvík kl. 12.

**Wensil Hansen, Toftir**, andaðist mánadagin, 43 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17 í Fríðrikskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Wensil kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina gávu. Konta í peningastovunum.

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri sonur og beiggi

**Vensil Hansen**
Toftir

andaðist mánadagin 16. oktobur, 43 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 17.00.
Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni hósdagin klokkan 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Emma og Harry**
**Absalon og Hans**

# Sofus Poulsen í Smiðjuni

Fríggjadagin 21. oktober kl. 15 letur Sofus Poulsen, listamaður, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Sofus hevur í summar málað nógv úti í náttúruni, og 10 av teimum 20 málningunum á framsýningini eru málaðir úti. Øll myndevnini eru úr føroysku náttúruni.

Sofus sigur, at málningarnir eru litríkir, og litirnir svara til ársíðirnar.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 26. oktober, allar dagur frá 15-19, uttan leygardagin, tá opið er frá 13-18.



*Fríggjadagin 21. oktober letur Sofus Poulsen, listamaður, upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Dávur Davidsen**
Nes

doyði og bleiv jarðaður.

Tøkk til prest, berarar, kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávu til Vesturskin.
Ein serstøk tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jensia, Marianna, Anna Helena, Jan og Mathias**